


www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 06 - 2012

# Føroysku oljufeløgini bora báðumegin markið

Altjóða oljuheimurin hevur eyguni eftir Atlantsmótinum - økinum millum Føroyar og Hetland - í hesum døgum, har tveir sera áhugaverdir brunnar verða boraðir í løtuni. Annar í bretskum øki og hin í føroyskum øki. Og í báðum hesum brunnum er føroysk luttøka. Um somu tíð sum Statoil stendur fyri boringini av Brugduni á føroyska landgrunninum, borar BP ein brunn á djúpum vatn beint eystan fyri markið. Hesin brunnurin, North Uist, er tann fyrsti, sum bretska oljufelagið borar á djúpum vatni í heiminum eftir Macondo vanlukkuna í Meksikanska flógvanum í 2010. Meðan Cosl Pioneer hevur borað fyri Statoil í umleið 5 dagar, so hevur boriskipið Stena Carron borað fyri BP í 2-3 mánaðir. Hóast brunnarnir verða boraðir á ymsum landaøkjum, so er greitt, at teir kunnu geva nýggja vitan um alt hetta stóra økið. Á kortinum síggja vit, hvussu stutt er millum brunnarnar. Áhugavert er eisini at merkja sær tann áhuga, sum tvey av heimsins størstu oljufeløgum, BP og ExxonMobil hava fyri Atlantsmótinum tvs. undirgrundini um okkara leiðir. BP stendur sum er sum fyristøðufelag fyri fleiri av framleiðandi keldunum vestan fyri Hetland saman við enn einum av heimsins oljurisum, nevniliga Shell. At felagið nú er farið at bora ein nýggjan leitibrunn tættari markinum enn fyrr um somu tíð sum tað ger milliardaíløgur í útbygging av verandi oljukeldum, sigur so mikið sum, at økið vestan fyri Hetland telist millum tey oljuøkini í heiminum, sum framhaldandi stórar vóni eru til. Og hyggja vit at boringini á føroyska landgrunninum, har Statoil, ExxonMobil og Atlantic Petroleum vilja brúka eina milliard krónur, so einki at siga til, at stórur áhugi er fyri teimum báðum brunnunum. Forvitnisligt er eisini at síggja, bæði tey føroysku oljufeløgini eru við í boringunum. Atlantic Petrolum hesumegin og Faroe Petroleum hinumegin markið. Mynd - Kortið vísir hvussu stutt er millum leitiboringarnar báðumegin markið, har Cosl Pioneer borar á føroyska